LØGTINGSGRANNSKOÐARARNIR
Heini O. Heinesen – Magni Laksáfoss – Anfinn Kallsberg – Hans Pauli Strøm

Føroya Løgting.

**Løgtingsmál nr. 96/2009: Grannskoðan av almennum roknskapum**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna **landsroknskapin fyri fíggjarárið 2008** við hesum viðmerkingum.

## 1 Viðmerkingar:

Sambært § 19 í grannskoðanarlógini – Ll. nr. 25/1999 – skulu løgtingsgrannskoðararnir í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja fyri Løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum saman við viðmerkingum sínum.

Endamálið við grannskoðanini er at ansa eftir:

- *at* allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- *at* eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,
- *at* roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,
- *at* hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um, og
- *at* roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Løgtingsgrannskoðararnir skulu gera vart við, at tað er sjálvur Landsroknskapurin 2008, sum mælt verður til at góðkenna, saman við teimum atfinningum, sum eru nevndar í viðmerkingunum. Tað merkir ikki, at Løgtingið góðkennir, at meirnýtsla er farin fram og at játtanir ikki eru hildnar.

Arbeiðið hjá løgtingsgrannskoðarunum byggir á frágreiðingar frá Landsgrannskoðanini og frá privatum grannskoðarum. Umframt ársfrágreiðingina í oktober 2008 hevur Landsgrannskoðanin í september 2008 latið løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing “um frávik millum játtan og nýtslu”.

Frágreiðingarnar frá Landsgrannskoðanini eru lagdar við sum fylgiskjal 1 og 2, og ein samandráttur av frágreiðingunum frá privatu grannskoðarunum er lagdur við sum fylgiskjal 3. Landsroknskapurin 2008 er lagdur við sum fylgiskjal 4.

Viðmerkingarnar frá løgtingsgrannskoðarunum eru í hesum brotum:

2 Viðmerkingar til frágreiðing um frávik millum játtan og nýtslu (Fylgiskjal 1) ........ 2
3 Viðmerkingar til ársfrágreiðing frá Landsgrannskoðanini (Fylgiskjal 2) ........ 4
4 Frágreiðingar frá privatum grannskoðarum (Fylgiskjal 3) ........ 9
5 Høvuðstøl úr landsroknskapinum seinastu árini ........ 10

# 2 Viðmerkingar til frágreiðing um frávik millum játtan og nýtslu (Fylgiskjal 1)

Eins og undanfarin ár halda løgtingsgrannskoðararnir tað als ikki vera nøktandi, at tað ár eftir ár eru so stór frávik.

Hinvegin fegnast løgtingsgrannskoðararnir um, at tað tykist, sum fokus er sett á økið, og at nýggj amboð verða ment til at stuðla hesum arbeiði.

## 2.1 Frávik, inntøkur

### Inntøkurnar av skatti eru um 6 mió.kr. hægri enn mett var á fíggjarlógini (s. 24)

Inntøkurnar av vanligum landsskatti eru 92,8 mió.kr. lægri enn mett var. Sambært landsstýrismanninum stendst frávikið av einari millumrokning viðvíkjandi FAS-inntøkuni fyri nøkur ár, sum er afturførd til kommununar.

"Felagsskattur" og "Kapitalvinningsskattur", eru ávikavist 53,5 mió.kr. og 41,6 mió.kr. hægri, enn mett var. Eftirsum 2007 gjørdist eitt gott ár fyri vinnulívið sum heild, kom væl meira inn í felagsskatti og kapitalvinningsskatti í 2008.

### Meirvirðisgjald o.o. avgjøld 207 mió.kr. lægri, enn mett var á fíggjarlógini (s. 24-25)

Størstu frávikini eru "Meirvirðisgjald" 134,8 mió.kr. lægri, "Punktgjald" 26,7 mió.kr. lægri og "Skrásetingargjald" 21,2 mió.kr. lægri, enn mett var.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at fíggjarkreppan hevur havt við sær, at inntøkurnar av meirvirðisgjaldi, punktgjøldum, og serstakliga skrásetingargjaldi - síðstu 4 mánaðirnar í 2008 - gjørdust lægri enn mett var.

## 2.2 Frávik, útreiðslur o.a.

Samlaða meirnýtslan fíggjarárið 2008 er um 158 mió.kr. Í frágreiðingini hevur Landsgrann-skoðanin greitt frá teimum mest týðandi frávikunum.

### Løgmansfyrisitingin (s. 15-17)

Meirnýtslan er 1,4 mió.kr. á játtanini "Løgmaður og landsstýrið".

### Fíggjarmál (s. 19-28)

Meirnýtslan er um 20 mió.kr. á 7 játtanum. Harafturat eru væntaðu inntøkurnar 5 mió.kr. lægri, tí ætlaða sølan av partabrøvum í P/f Elektron varð av ongum. Størstu meirnýtslurnar eru stuðul til rentuútreiðslur, um 11,5 mió.kr., læraraeftirlønir 3,5 mió.kr., og stuðul til flutning og dupult húsarhald, 3,2 mió.kr.

### Fiskivinnumál (s. 29-34)

Meirnýtslan er um 10 mió.kr. á 10 játtanum. Størsta meirnýtslan er á játtanini til inntøkutrygd hjá fiskimonnum, 3,8 mió.kr.

### Vinnumál (s. 35-42)

Meirnýtslan er 14 mió.kr. á 4 játtanum. Størsta meirnýtslan er á játtanini til Strandfaraskip Landsins, um 7 mió.kr. Harafturat eru væntaðu inntøkurnar 6,2 mió.kr. lægri. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2008 var ætlanin í 2008 at selja partabrøvini í Sp/f Atlanticon, P/f Smyril Line og P/f Tjaldur fyri 6,6 mió.kr. Í 2008 eru bert partabrøvini í Sp/f Atlanticon seld. Prísurin var 462 t.kr.

### Mentamál (s. 43-52)

Meirnýtslan er um 23 mió.kr. á 18 játtanum. Størsta meirnýtslan er á játtanini til Skúladepil í Suðuroy, 9,6 mió.kr.

Sambært Ll. nr. 75/2005 v.s.b. "um at byggja skúladepil í Suðuroynni" kunnu byggi-útreiðslurnar til verkætlanina í mesta lagi vera 74 mió.kr. Sambært Búskaparskipan Landsins eru tilsamans nýttar 95 mió.kr., svarandi til ein meirkostnað á 21 mió.kr.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at tríggjar høvuðsorsøkir eru til frávikið:

a) 7,7 mió.kr. til innbúgv og útgerð vóru ikki við í verklagslógini,
b) 4 mió.kr. til vatn og kloakk vóru ikki við í verklagslógini, og
c) talan er harumframt um eykakrav, 9,3 mió.kr., sum byggiharrin ikki vil góðtaka.

Sama er galdandi fyri Tekniska Skúlan í Klaksvík og Fiskivinnuskúlan, har útreiðslurnar eru ávikavist 5,3 mió.kr. og 7,3 mió.kr. hægri, enn ásett í verklagslógunum.

Løgtingsgrannskoðararnir átala at útreiðslukarmarnir í verklagslógunum ikki verða hildnir.

### Heilsumál (s. 53-66)

Meirnýtslan er um 24 mió.kr. á 6 játtanum. Størsta meirnýtslan stavar frá játtanini til Serviðgerð Uttanlands, 17 mió.kr. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at ein trupulleiki í framskrivingunum í 2008 var, at rokningar og aðrar upplýsingar frá donsku sjúkrahúsunum vóru sera nógv seinkaðar.

### Almannamál (s. 67-77)

Meirnýtslan er um 37 mió.kr. á 8 játtanum. Størsta meirnýtslan er á játtanini "Vanlig Forsorg", 14 mió.kr. Størsta meirnýtslan stavar frá útreiðslum til "Endurbúgving § 18", um 12 mió.kr. Landsstýrismaðurin hevur víst á, at hevði eykajáttanin í eykajáttarlógini verið gingin á møti, hevði meirnýtslan verið væl minni.

### Innlendismál (s. 79–82)

At kalla eingin meirnýtsla er, men væntaðu inntøkurnar vóru 10 mió.kr. lægri, tí ætlaða sølan av oljutangunum, sum landið eigur í Sørvági og í Søldarfirði, varð av ongum.

### Uttanríkismál (s. 83–84)

At kalla eingin meirnýtsla.

## 2.3 Onnur viðurskifti

### Játtanarviðurskifti (s. 9–11)

Játtanarárið 2008 var merkt av, at upprunaliga uppskotið til løgtingsfíggjarlóg 2008 fall burtur, tí løgtingsval varð skrivað út 6. desember 2007. Ein bráfeingis játtanarlóg fyri 2008 kom tí í gildi 1. januar 2008.

Ikki fyrr enn 22. apríl 2008 varð eitt endurskoðað uppskot til løgtingsfíggjarlóg 2008 lagt fram. Tað varð samtykt 30. mai 2008, og lýst 10. juni 2008.

Landsgrannskoðanin heldur ikki, at samskiftið millum Almannamálaráðið og Fíggjarmála-ráðið hevur verið nøktandi í málinum um eykajáttan í november 2009.

Í frágreiðingini hevur Landsgrannskoðanin greitt gjøllari frá um tilgongdina til umbønirnar um eykajáttan, og hví tær komu so seint til Løgtingið.

### Ógreiða um verklagslógir (s. 13–14)

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur víst á, at útreiðslur til útgerð og innbúgv vanliga ikki verða roknaðar við í upprunaliga byggikostnaðin, sum er kunngjørdur í verklagslógini, men verða tiknar við sum ein útreiðsla seinasta byggiárið.

Landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur víst á, at tað hevur verið vanligt, í sambandi við verklagslógir, at positivar viðmerkingar hava staðið í lógini, um hon ikki fevndi um innbúgv og útgerð.

Sostatt heldur landsstýrismaðurin í mentamálum, at útreiðslur til útgerð og innbúgv ikki verða roknaðar við í byggikostnaðin í einari verklagslóg, meðan landsstýrismaðurin í heilsumálum hinvegin heldur, at útgerð og innbúgv verður roknað sum ein natúrligur partur av verkætlanini, um einki annað er viðmerkt í verklagslógini.

Løgtingsgrannskoðararnir halda tað vera óheppið, at ógreiða er um, hvørjar útreiðslur eru fevndar av verklagslógunum, og løgtingsgrannskoðararnir heita á landsstýrismannin í fíggjarmálum um at taka støðu til spurningin.

# 3 Viðmerkingar til ársfrágreiðing frá Landsgrannskoðanini (Fylgiskjal 2)

## 3.1 Formlig viðurskifti

### Góðkenningarmannagongdir (s. 9-11)

Tá ið havt verður í huga, at góðkenningarmannagongdirnar eru grundarlagið undir ársroknskapinum, heldur Landsgrannskoðanin tað als ikki vera nøktandi, at reglurnar um at lata inn góðkenningarskjøl ikki verða hildnar.

Løgtingsgrannskoðararnir heita enn einaferð á løgmann, landsstýrismenn og aðalstjórar um at syrgja fyri, at ásetingarnar í roknskaparkunngerðini verða hildnar. Løgtingsgrannskoðararnir fegnast tó um, at nýggj skipan er ment, sum skal styrkja um góðkenningarmannagongdirnar.

### Stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit (s. 11-12)

Sambært §7 í roknskaparkunngerðini skulu aðalráðini og stovnar teirra í seinasta lagi 1. januar 2010 hava sett í verk stýringarmeginreglur um mál, nádd úrslit o.t. Bert fáir stovnar hava sett í verk reglur um mál og nádd úrslit.

Í fíggjarlógaruppskotinum 2010 eru næstan ongar lýsingar av teimum úrslitum, miðað verður ímóti við játtanini, ella upplýsingar um nádd úrslit o.t.

### Hóskandi tíðarskrásetingar (s. 12-13)

Samanumtikið hava bert fáir landsstovnar hóskandi tíðarskráseting, har tað eisini sæst, hvat arbeiðstíðin verður brúkt til.

Í uppskoti til samtyktar, sum varð samtykt av Løgtinginum 23. apríl 2009, mæltu Løgtingsgrannskoðararnir staðiliga løgmanni, landsstýrismonnum og aðalstjórum til at hava eyguni eftir, at hóskandi skrásetingar av nøgdarupplýsingum og tilfeingisnýtslu (t.d. tíðarnýtslu hjá starvsfólkum) verða settar í verk til ásettu tíðina.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla enn einaferð løgmanni, landsstýrismonnum og aðalstjórum til at hava eyguni eftir, at hóskandi skrásetingar av nøgdarupplýsingum og tilfeingisnýtslu verða settar í verk.

## 3.2 Løgmansfyrisitingin

### Samskiftisútreiðslur hjá landsstýrinum (s. 15-16)

Síðani 2000 hevur Landsgrannskoðanin víst á, at ongin lógarheimild er at endurrinda samskiftisútreiðslur hjá løgmanni og landsstýrismonnum.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at málið framvegis ikki er loyst, hóast Løgtingið í uppskotum til samtyktar fleiri ferðir hevur mælt løgmanni til at greiða spurningin um lógarheimildina.

### Um lógarsmíð (s. 16-17)

Síðani 2003 hevur Landsgrannskoðanin í frágreiðingum gjørt vart við, at lógargrundarlagið sum heild tykist vera eitt tað størsta vandamálið í umsitingini. Á fleiri málsøkjum er lógargrundarlagið ófullfíggjað**.**

Í 2007 boðaði Løgmaður frá, at hann hevði sett í verk eitt útgreiningararbeiði til tess at betra um lógardygdina. Ein arbeiðsbólkur var settur við einum umboði úr hvørjum stjórnarráði. Í oktober 2009 hevur Løgmansskrivstovan greitt frá, at í stuttum ber til at siga, at Innlendismálaráðið, sum umsitur løgmál, ikki sær seg ført fyri at gjøgnumføra verkætlanina sum ætlað.

Løgtingsgrannskoðararnir hava fleiri ferðir áður víst á, at verandi trupulleikar við lógarsmíði eru eitt langtíðar vandamál, ið løgmaður má taka stig til at loysa sum skjótast. Løgtingsgrannskoðararnir undrast tí á, at økið ikki verður raðfest.

## 3.3 Fíggjarmál

### Landsroknskapurin ikki fullfíggjaður (s. 19-20)

Seinastu nógvu árini hava Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir ferð eftir ferð gjørt vart við, at fleiri stovnar og grunnar eru ikki við á fíggjarlógini og í landsroknskapinum.

Í august 2009 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fíggjarmálaráðið hevur tikið støðu í málinum, so grunnar o.o., sum stríð hevur staðist um, verða tiknir við í landsroknskapin. Fíggjarmálaráðið fer at krevja av almennu grunnunum, at teir fylgja roknskaparreglunum, og at teir hvønn mánað, frá 1. januar 2010, skulu senda Fíggjarmálaráðnum frágreiðing um roknskapartøl.

### Tænastumannaeftirlønir o.t. (s. 22-23)

Fíggjarmálaráðið hevur sett í verk nøkur tiltøk at samskipa umsitingina av tænastumannaeftirlønum, men enn er ikki komið á mál.

### Um ávísar útreiðslur (s. 23-26)

Í fleiri uppskotum til samtyktar hava løgtingsgrannskoðararnir mælt landsstýrismanninum í fíggjarmálum til at áseta hóskandi og fullgreiðar reglur um ávísar útreiðslur, ið liggja á markinum til privatútreiðslur ella fríar ágóðar.

Landsgrannskoðanin heldur tað neyvan tæna nøkrum endamáli framhaldandi at umrøða hetta mál í ársfrágreiðingum, eftirsum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum eftir øllum at døma ongar ætlanir hevur um at áseta reglur.

Løgtingsgrannskoðararnir átala enn einaferð harðliga, at hesi viðurskifti ikki eru fingin í rættlag.

### Kapitalogn í landsfyritøkum (s. 28-29)

Ongin allýsing finst av hugtakinum “landsfyritøka”. Í nógv ár hevur Løgtingið í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin mælt til at fáa greiði á hesum roknskaparposti.

### Partabrøv skrásett í landsroknskapinum (s. 29-32)

Í landsroknskapinum er partapeningurin skrásettur við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, til yvirkurs og til útgávukurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um aktuella virðið á feløgunum.

### Ognir og útbúnaður (s. 34-35)

Hóast meira enn 13 ár eru liðin, síðani kravið um at skráseta almennar ognir kom í gildi, hava bert fáir stovnar dagført ognaryvirlit.

### Tøkur peningur (s. 35-36)

Fleiri landsstovnar og -grunnar, ofta við leysum tilknýti til fíggjarlógina og/ella landsbókhaldið, hava fleiri hundrað milliónir krónur standandi á banka- og girokontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

### Umsiting av skatti, avgjøldum o.a. (s. 39-59)

Síðani miðskeiðis í 90-árunum hevur Landsgrannskoðanin á hvørjum ári víst á, at tørvur er á at áseta mannagongdir fyri umsitingina. Landsgrannskoðanin vísir í frágreiðingini á dømir um, at landskassin fær ikki altíð sínar inntøkur. Samanumtikið ásannar Landsgrannskoðanin, at langt er eftir á mál at áseta reglur fyri umsitingina og at seta í verk innaneftirlit á TAKS, sum skal tryggja, at roknskapurin er rættur. Nýggja leiðslan hevur boðað frá, at hon hevur sett sær fyri at fáa greiði á, hvussu innaneftirlitið skal verða skipað.

Løgtingsgrannskoðararnir heita staðiliga á landsstýrismannin í fíggjarmálum um alt fyri eitt at seta tiltøk í verk fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.

## 3.4 Fiskivinnumál

### KT-viðurskiftini hjá Lønjavningarstovuni (s. 62-63)

Síðani 2004 hevur Landsgrannskoðanin ferð eftir ferð víst á, at trupulleikarnir í gomlu KT-skipanunum hjá Lønjavningarstovuni eru ikki loystir. Hóast peningur fleiri ferðir er játtaður á fíggjarlógini til hetta arbeiði, er onki hent.

Í juni 2009 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann í 2010 ætlaði at seta sjøtul á at menna nýggja KT-skipan til Lønjavningarstovuna.

### Fiskiveiðieftirlitið (s. 66-70)

Í desember 2008 gjørdi Landsgrannskoðanin Fiskiveiðieftirlitinum varugt við, at Fiskiveiðieftirlitið hevði goldið ov nógvan dagpening til starvsfólk, ið ferðast fyri stovnin.

Í mai 2009 heitti Landsgrannskoðanin á leiðsluna á Fiskiveiðieftirlitinum um at eftirkanna allar ferðauppgerðir fyri 2007 og 2008, tí stakroyndir vístu, at fleiri feilir vóru í. Leiðslan varð eisini biðin um at krevja ov nógv goldnan pening innaftur, og at boða Landsgrannskoðanini frá, tá ið tað var gjørt. Landsgrannskoðanini kunnugt er peningurin ikki goldin innaftur.

Í november 2009 bað Fiskimálaráðið Fiskiveiðieftirlitið rætta skeivleikarnar í ferðauppgerðunum. Nýggjar stakroyndir benda á, at nýggjastu ferðauppgerðirnar eru rættar.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrismanninum til at fáa viðurskiftini viðvíkjandi teimum skeivu ferðauppgerðunum í rættlag.

### Tyrlutænastan (s. 71-74)

Landsgrannskoðanin heldur tað vera brot á sáttmálan, sum Atlantic Airways hevur gjørt við Landsstýrið, at felagið nýtir Bell 412 og Bell 212 í frálandavinnu uttanlands.

Landsgrannskoðanin kann ikki góðtaka, at so long tíð gongur at fáa svar, tí tað darvar arbeiðinum hjá Landsgrannskoðanini. Í § 20 í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum" stendur, at øll skriv og viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum og roknskapargrannskoðanini skulu svarast innan 6 vikur, um longri freist ikki verður sett.

Svarini frá Fiskimálaráðnum eru heldur ikki nøktandi, og Landsgrannskoðanin heldur ikki at tað kann góðtakast, at Fiskimálaráðið letur vera við at svara mesta partinum av spurningunum við at vísa til teirra sáttmálapart – Atlantic Airways.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrismanninum til at umhugsa endurgjaldskrav móti Atlantic Airways fyri brot á sáttmálan.

Løgtingsgrannskoðararnir átala harðliga, at so long tíð gongur áðrenn Fiskimálaráðið svarar skrivum frá Landsgrannskoðanini, og at Fiskimálaráðið letur vera við at svara mesta partinum av spurningum.

## 3.5 Vinnumál

### P/f Fiskaaling og havbúnaðarroyndir (s. 83-85)

Í seinasta uppskoti til samtyktar mæltu Løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum í vinnumálum til at taka upp spurningin, um tað er skilagott at reka tílíkt virksemi í einum partafelag.

Landsstýrismaðurin hevur víst á, at skipanin við P/f Fiskaaling hevur víst seg at rigga væl, og landsstýrismaðurin er sera væl nøgdur við arbeiðið, sum P/f Fiskaaling ger. Sum eina staðfesting av hesum, vísir landsstýrismaðurin til, at Løgtingið í mai 2009 samtykti at hækka partapeningin í felagnum við fænum í Endurgjaldsgrunni Alivinnunnar.

## 3.6 Mentamál

### Óloyst mál (s. 92-106)

Í frágreiðingum frá Landsgrannskoðanini og í uppskotum til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum sæst, at nógv mál verða umrødd í áravís, uttan at nakað ítøkiligt hendir. Vísandi til frágreiðingina frá Landsgrannskoðanini eru framvegis óloyst mál innan útbúgving og gransking:

- Vantandi reglur um Yrkisskúlar (s. 92)
- Umsiting av Musikkskúlaskipanini (s.94)
- Samskipan av virkseminum hjá sjómansskúlunum (s. 98-99)
- Játtanar-, roknskapar- og ognarviðurskiftini hjá Listasavni Føroya (s. 106).

Løgtingsgrannskoðararnir átala enn einaferð, at málini ikki verða loyst, og heita enn einaferð á landsstýrismannin í mentamálum um at taka stig til at málini, sum eru nevnd frammanfyri, verða loyst.

### Húsarhaldsskúli Føroya (s. 95)

Landsgrannskoðanin heldur, at sæð frá einum eftirlitssjónarmiði er tað óheppið, at landið veitir Húsarhaldsskúla Føroya árligan stuðul, 2,1 mió.kr., sum "onnur játtan". Verður játtanin tikin við á fíggjarlógina sum "rakstrarjáttan", kemur skúlin undir at kalla somu játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarreglur, sum galda fyri landsstovnar.

Mentamálaráðið hevur í oktober 2009 kunnað um, at støða ikki er tikin til at broyta játtanarslagið.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla enn einaferð landsstýrismanninum í Mentamálum til at taka upp spurningin, um tað ikki er skilabetri at játtanin til Húsarhaldsskúla Føroya verður tikin við á fíggjarlógina sum rakstrarjáttan.

## 3.7 Almannamál

### Reglur um endurbúgving o.a. (s.115-116)

Nærum 20 ár eru liðin, síðani Landsgrannskoðanin fyrstu ferð heitti á Landsstýrið um at áseta gjøllari reglur um stuðul til endurbúgving o.a.

Í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin hava løgtingsgrannskoðararnir ferð eftir ferð átalað, at landsstýrismaðurin ikki hevur ásett reglurnar á hesum týðandi øki, har nógvur peningur verður brúktur.

Løgtingsgrannskoðararnir átala enn einaferð, at neyvari reglur um endurbúgving o.a. enn ikki eru ásettar, hóast hesin trupulleiki hevur verið umrøddur í frágreiðingum í áravís.

### Vantandi dagføring av forsorgarlógini (s. 104-106)

Síðani miðskeiðis í nítiárunum hava skiftandi landsstýrismenn í almannamálum boðað frá, at teir hava arbeitt við nýggjari lóggávu, og at øll almannalóggáva fór at verða lagað til føroysk nútíðarviðurskifti innan stutta tíð. Enn er onki lógaruppskot lagt fyri Løgtingið.

Í september 2009 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Almannamálaráðið er farið í gongd við at endurskoða forsorgarlógina. Arbeiðið við at endurskoða §§ 9 og 13 í forsorgarlógini verður gjørt saman við arbeiðinum at endurskoða skipanina við endurbúgving og vardum størvum. Arbeiðið skal verða liðugt á heysti 2010.

### Endurgjald av pensjónum fyri føroyingar á stovni í Danmark (120-122)

Í fleiri ár eru næstan ongi krøv goldin viðvíkjandi endurgjaldi av pensjónum. Socialministeriet í Danmark hevur ikki sett reglur í kunngerð, og tí ivast Landsgrannskoðanin í, um donsku kommunurnar hava nakað rættarligt krav til endurgjald.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrismanninum í almannamálum til beinanvegin at fáa greiði á spurninginum.

### Húsið í Klaksvík til børn við autismu (123-126)

30. apríl 2009 var Landsgrannskoðanin á eftirlitsvitjan í Klaksvík, í sambandi við at Almannamálaráðið í 2007 hevði keypt ein bygning, sum skuldi hýsa børnum við autismu. Bygningurin er enn ikki tikin í nýtslu. Ein høvuðsorsøk til at arbeiðið hevur drigið út er, at samskifti millum ymisku partarnar í málinum ikki hevur verið nóg gott.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla til at gera greiðar mannagongdir fyri samskifti og ábyrgd í slíkum málum, so gongdin í sambandi við ognina í Klaksvík ikki endurtekur seg.

## 3.8 Uttanríkismál

### Uttanríkisráðið (s. 131-136)

Landsgranskoðanin vísir á, at Uttanríkisráðið uttan góðkenning frá Føroya Gjaldstovu í november 2008 útvegaði 12 kredittkort til starvsfólk. Kredittkortini vórðu knýtt at peningastovnskontu hjá Føroya Gjaldstovu.

Í juli 2009 hevur Uttanríkisráðið fingið loyvi frá Føroya Gjaldstovu at stovna peningastovnskontu til kredittkort. Nýggj kredittkort vórðu tí útvegað.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at Uttanríkisráðið uttan loyvi frá Gjaldstovuni útvegaði sær kredittkort knýtt at peningastovnskontu hjá Føroya Gjaldstovu.

Fleiri størv í Uttanríkisráðnum vórðu ikki lýst leys, og umbønir um flokking og góðkenning av tænastumannastørvunum vórðu ikki sendar Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum, áðrenn tey vórðu sett.

Vísandi til frágreiðingina hava Uttanríkisráðið og Lønardeildin hjá Fíggjarmálaráðnum ymiskar áskoðanir á, hvørjar reglur galda fyri setanarviðurskiftini hjá sendimonnum, ið koma aftur til Føroya eftir tænastu á sendistovum uttanlands.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrismanninum í uttanríkismálum og landsstýrismanninum í starvsfólkamálum til at fáa greiði á hesum viðurskiftum.

## 4 Frágreiðingar frá privatum grannskoðarum (Fylgiskjal 3)

Í hjálagda fylgiskjali „Samandráttur av frágreiðingum frá privatum grannskoðarum" er kunnað um viðmerkingar í grannskoðanarfrágreiðingum frá privatu grannskoðarunum.

Vísandi til pkt. 3.2 átala Løgtingsgrannskoðararnir at Búnaðargrunnurin letur Gjaldstovuni roknskapardátur ov seint.

Vísandi til pkt. 4.9 átala Løgtingsgrannskoðararnir harðliga, at eingin formlig avtala er gjørd um, hvussu býtið av ársúrslitinum hjá Listasavninum skal vera, hóast málið er umrøtt í áravís.

Vísandi til pkt. 7.2 halda Løgtingsgrannskoðararnir at viðmerkingarnar frá grannskoðaranum hjá Strandferðsluni eru álvarsligar, og løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrismanninum í vinnumálum til at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í fleiri frágreiðingum ger grannskoðarin ger vart við, at tá ið lønir verða goldnar út gjøgnum felagslønarskipanina hjá Føroya Gjaldstovu, har eitt felags V-tal verður nýtt, ber ikki til at fáa eina útskrift fyri 2008 frá TAKS fyri goldnar lønir, vísandi til § 118 í skattalógini. Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrismanninum í fíggjarmálum til at taka málið upp við grannskoðaran og Gjaldstovuna.

**Løgtingsgrannskoðararnir, 10. februar 2010**

| | |
|---|---|
| Heini O. Heinesen, formaður | Magni Laksáfoss |
| Anfinn Kallsberg | Hans Pauli Strøm |

# 5 Høvuðstøl úr landsroknskapinum seinastu árini

Niðanfyri hava løgtingsgrannskoðararnir sett upp nøkur útvald høvuðstøl úr landsroknskap inum seinastu árini. Yvirlitini lýsa á ongan hátt gongdina út í æsir, men ætlanin er heldur á ein lættan hátt at kunna løgtingið um gongdina í nøkrum høvuðstølum.

## 5.1 Inntøkur landskassans

Inntøkur landskassans hava árini 2004 – 2007 verið støðugt vaksandi úr 3.400 mió.kr. í 4.205 mió.kr. Roknskapurin 2008 vísir hinvegin eitt fall á inntøkunum uppá um 1,2%. Niðurgongdin hevur hildið fram í 2009[1] við um 3,4% í mun til roknskapin 2008.

Mió.kr.

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | *2009* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattainntøkur | 1.539 | 1.508 | 1.681 | 1.791 | 1.829 | *1.774* |
| Avgjaldsinntøkur | 1.259 | 1.322 | 1.547 | 1.722 | 1.629 | *1.498* |
| Ymsar inntøkur | 41 | 67 | 120 | 45 | 44 | *20* |
| Heildarveiting o.t. | 633 | 631 | 632 | 632 | 635 | *636* |
| Rentur | -72 | -71 | 8 | 15 | 16 | *54* |
| **Tilsamans** | **3.400** | **3.457** | **3.988** | **4.205** | **4.153** | ***3.982*** |

*Nettotøl*

Skattainntøkurnar eru árini 2004 – 2008 øktar úr 1.539 mió.kr. í 1.829 mió.kr, ella 290 mió.kr., svarandi til um 19%. Í 2009 eru skattainntøkurnar hinvegin lækkaðar slakar 100 mió. kr., svarandi til 5%. Serstakliga felagsskatturin, kapitalvinningsskattur og kolvetnisskatturin eru lækkaðir 165 mió.kr., meðan vanligur landsskattur og avgjald av kapitaleftirlønum eru hækkaðar 75 mió.kr.




Avgjaldsinntøkurnar eru tíðarskeiðið 2004 – 2008 øktar úr 1.259 mió.kr. í 1.629 mió.kr., ella 370 mió.kr., svarandi til góð 29%. Í 2009 eru avgjaldsinntøkurnar lækkaðar góðar 100 mió.kr. til 1.498[2] mió.kr. Talan er í høvuðsheitum um minni inntøkur frá meirvirðisgjaldi og skrásetingargjøldum.

[1] Tøl smb. Búskaparskipan Landsins pr. 8. februar 2010
[2] Tøl smb. Búskaparskipan Landsins pr. 8. februar 2010

## 5.2 Útreiðslur landskassans

Útreiðslujáttanir landskassans hava árini 2004 – 2008 eisini verið støðugt vaksandi úr 3.552 mió.kr. í 4.483 mió.kr.

Mió.kr.

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | *2009* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 160 | 184 | 195 | 140 | 236 | *175* |
| Rakstrarjáttan | 2.000 | 2.088 | 2.194 | 2.387 | 2.619 | *2.642* |
| Lógarbundin játtan | 1.164 | 1.196 | 1.190 | 1.239 | 1.396 | *1.495* |
| Løgujáttan | 228 | 201 | 268 | 292 | 232 | *173* |
| **Tilsamans** | **3.552** | **3.669** | **3.847** | **4.058** | **4.483** | ***4.485*** |

### 5.2.1 Gongdin í rakstrarútreiðslunum

Útreiðslurnar í landsroknskapinum eru býttar á høvuðsøki. Høvuðsøki 1 er rakstrarútreiðslur, sum eru greinaðar á standardkonturnar fyri lønir, keyp av vørum og tænastum, keyp av útbúnaði, leigu, viðlíkahald og skatt o.a. (st.konta 11-19). Samlaðu rakstrarútreiðslurnar fíggjarárið 2008 vóru góðar 3 mia.kr. Niðanfyri er ein talva, sum vísir vøksturin í samlaðu rakstrarútreiðslunum. Sum sæst eru rakstrarútreiðslurnar øktar støðugt árini 2004 – 2008:

mió.kr.

| St. kta | Heiti | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | *2009* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 1.718 | 1.707 | 1.769 | 1.889 | 2.031 | *2.112* |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 797 | 826 | 878 | 963 | 1.057 | *964* |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 70 | 78 | 96 | 96 | 89 | *66* |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | 78 | 75 | 86 | 96 | 100 | *103* |
| 17 | Avskrivingar o.a. | 3 | 1 | 0 | 1 | 2 | *0* |
| 19 | Ymsar rakstrarútreiðslur | 14 | 13 | 13 | 14 | 13 | *4* |
| | **Tilsamans** | **2.680** | **2.700** | **2.842** | **3.059** | **3.292** | ***3.249*** |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -637 | -573 | -596 | -635 | 633 | *581* |
| 25-85 | Annað | -43 | -39 | -52 | -37 | -40 | *26* |
| | **Rakstrarjáttan** | **2.000** | **2.088** | **2.194** | **2.387** | **2.619** | ***2.642*** |

### 5.2.2 Gongdin í lógarbundnum útreiðslum og inntøkum

Talvan niðanfyri vísir lógarbundnu útreiðslurnar fyri hvørt málsøki árini 2004 til 2008. Eisini útreiðslurnar í 2009[3] eru við á talvuni. Viðmerkjast skal, at uppbýtið á málsøkir kann ganga uppá tvørs av aðalráðum. Á talvuni sæst, at lógarbundnu útreiðslurnar frá 2004 til 2008 eru øktar tilsamans um 231 mió.kr., ella 19,8%.

mió.kr.

| Málsøki | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Løgtingið | 3 | 3 | 3 | 3 | 5 | *5* |
| Lógarmál | -1 | -1 | -1 | -1 | -1 | *0* |
| Almenn starvsfólk v.m. | 17 | 18 | 19 | 19 | 22 | *22* |
| Heilsumál | 12 | 13 | 15 | 15 | 16 | *18* |
| Almannamál | 821 | 849 | 817 | 840 | 914 | *944* |
| Íbúðarmál | 58 | 59 | 58 | 84 | 123 | *141* |
| Útbúgving og gransking | 107 | 114 | 121 | 120 | 142 | *153* |
| Fiskivinna | 50 | 48 | 38 | 27 | 32 | *42* |
| Sjóvinna | 20 | 24 | 46 | 62 | 52 | *69* |
| Samferðsla og samskifti | 0 | 3 | 4 | 4 | 4 | *6* |
| Arbeiðsmarknaður | 77 | 66 | 70 | 66 | 83 | *76* |
| **Tilsamans** | **1.164** | **1.196** | **1.190** | **1.239** | **1.396** | ***1.476*** |
| **Indeks (2004=100)** | **100,0** | **102,7** | **102,2** | **106,4** | **119,8** | ***126,8*** |

[3] Hetta er ikki endaligu tølini fyri 2009

Á talvuni sæst eisini, at ávís málsøkir eru hækkað nógv, nevnast kunnu almannamál, íbúðarmál, útbúgving og gransking og sjóvinna. Gongdin 2004-2008 er avmyndað í striku-myndini niðanfyri. Almannamál eru hækkað 94,6 mió.kr., ella 12%, íbúðarmál 65,5 mió.kr., ella 114%, útbúgving og gransking 35,3 mió.kr. ella 33% og útreiðslurnar til sjóvinnu eru hækkaðar 31,3 mió.kr., ella 154%.

### 5.2.3 *Almannamál*

Málsøkið almannamál kann býtast sundur í fleiri høvuðskontur. Tær størstu høvuðskonturnar eru fólkapensjón, fyritíðarpensjón, vanlig forsorg og dagpeningaskipanin.

1.000 kr.

| **Høvuðskontur** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | ***2009*** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkapensjón | 364.527 | 372.376 | 376.212 | 381.726 | 392.635 | *404.445* |
| Fyritíðarpensjón | 193.457 | 195.892 | 213.938 | 211.401 | 237.820 | *256.610* |
| Vanlig forsorg | 129.326 | 143.410 | 119.399 | 130.712 | 150.014 | *156.062* |
| Dagpeningaskipanin | 47.604 | 52.306 | 50.456 | 56.404 | 58.895 | *55.196* |

Á talvuni og strikumyndunum sæst, at útreiðslurnar á øllum hesum høvuðskontum eru øktar frá 2004 til 2008. Útreiðslurnar til fólkapensjón hækkaðu 28,1 mió.kr., ella 8%, fyritíðarpensjón 44,4 mió.kr., ella 23%, vanlig forsorg 20,7 mió.kr., ella 16% og útreiðslurnar til dagpeningaskipanina hækkaðu 11,3 mió.kr. ella 24%.







Lækkingin á frammanfyri vístu strikumynd av útreiðslunum í vanligari forsorg árini 2005 til 2006 stavar frá, at útreiðslurnar til stuðlar hjá brekaðum børnum fyri ein part vórðu lagdar til kommurnar og ein partur varð lagdur í rakstrarjáttan til Børn og Ung.

### 5.2.4 *Íbúðarmál*

Nógv tann størsta høvuðskontan undir málsøkinum íbúðarmál er rentustudningur til húsa-bygging. Undir málsøkinum er m.a. eisini høvuðskontan “stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði”. Í 2007 vóru útreiðslurnar á hesari kontu 491 tkr., í 2008 8,9 mió.kr. og í 2009 28,0 mió.kr.

1.000 kr.

| **Høvuðskontur** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | ***2009*** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Studningur til rentuútreiðslur | 56.386 | 56.428 | 57.208 | 82.981 | 112.457 | *112.979* |
| Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði | 0 | 0 | 0 | 491 | 8.929 | *28.036* |

Á talvuni og strikumyndunum niðanfyri sæst, at útreiðslurnar til rentustudning eru støðugar árini 2004 til 2006. Árini 2007 og 2008 hækkaðu útreiðslurnar munandi. Frá 2004 til 2008 hækkaðu útreiðslurnar 56,1 mió.kr. ella 99%. So at siga allur vøksturin er frá 2007 til 2008.







## 5.2.5 *Útbúgving og gransking*

Tær størstu høvuðskonturnar undir málsøkinum útbúgving og gransking eru lestrarstuðul og læraraeftirlønir.

1.000 kr.

| **Høvuðskontur** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | ***2009*** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Lestrarstuðul | 64.810 | 70.686 | 76.100 | 71.383 | 83.417 | *91.110* |
| Læraraeftirlønir | 27.978 | 31.751 | 33.312 | 36.854 | 43.757 | *48.002* |







Á talvuni og strikumyndunum frammanfyri sæst, at útreiðslurnar hækkaðu á báðum høvuðskontunum frá 2004 til 2008: Lestrarstuðulin er hækkaður 18,6 mió.kr. ella 29% og útreiðslur til læraraeftirlønir 15,8 mió.kr., ella 56%.

## 5.2.6 *Sjóvinna*

1.000 kr.

| **Høvuðskontur** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | ***2009*** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| FAS endurgjald (lógarb. útr.) | 20.346 | 24.397 | 45.894 | 61.806 | 51.645 | *68.608* |
| Skattainntøka frá FAS skipanini (ógreinað útr.) | 0 | 0 | -40.505 | -51.124 | -39.391 | *-76.375*[4] |
| **Nettoútreiðslur** | **20.346** | **24.397** | **5.389** | **10.682** | **12.254** | ***-7.767*** |

Undir málsøkinum sjóvinna, er bert ein høvuðskonta, nevniliga FAS endurgjald. FAS endurgjaldið er lógarbundin játtan, meðan skattainntøkurnar av FAS skipanini eru bólkaðar sum ógreinað játtan. Sostatt eru útreiðslurnar og inntøkurnar av FAS skipanini undir hvør sínum játtanarslagi. Á talvuni frammanfyri sæst, at nettoútreiðslurnar í 2004 vóru 20,3 mió. kr., meðan tær í 2008 vóru 12,3 mió.kr.

[4] Lógin er broytt í Ll. nr. 64 frá 10. juni 2008

## 5.3 Ogn landskassans

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum verður sett upp í kontuformi, ogn á aðrari síðu, og útjavningarkonta og skuld í hinari. Fyri nærri frágreiðing um fíggjarstøðu landsins verður víst til síðu 287 í Landsroknskapinum 2008. Niðanfyri eru sett upp nøkur høvuðstøl úr fíggjarstøðuni:

mió.kr.

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | *2009*[5] |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Parta-, og lutabrøv | 394 | 466 | 550 | 547 | 1.089 | *1.239* |
| Útlán | 339 | 370 | 389 | 334 | 650 | *643* |
| Kapitalinnskot | 1.647 | 1.159 | 1.113 | 886 | 544 | *544* |
| Áogn o.a. | 463 | 426 | 426 | 663 | 490 | *541* |
| Tøkur peningur | 1.824 | 1.697 | 1.485 | 2.765 | 2.508 | *2.044* |
| **Tilsamans** | **4.667** | **4.118** | **3.963** | **5.195** | **5.281** | ***5.011*** |

**Parta-, og lutabrøv**: Vøksturin í partabrøvunum bæði í 2008 og 2009 stavar í høvuðsheitum frá partapeninginum í P/f Vága Floghavn, P/f Norðoyatunnilin og P/f Fiskaaling.

**Útlán:** Veðhaldsútlegg, lestrarlán, lán til Húsalánsgrunnin, ymisk vinnulán, serlán, kurslán og stuðulslán. Haraftrat er í 2008 og 2009 gjaldførislán til Ríkisstjórn Íslands.




**Kapitalinnskot:** Í 2008 er kapitalognin hækkað við tí partinum av yvirskotinum í 2008 hjá P/f Føroya Banka, sum Fíggingargrunnurin eigur, 72,7 mió.kr. Harumframt er apportinnskotið á 414,3 mió.kr. í Vága Floghavn flutt til P/f Vága Floghavn. Ársenda 2008 er kapitalognin í landsfyritøkum 544 mió.kr.

**Áogn og tøkur peningur** er útgreinað niðanfyri.

### *5.3.1 Tøkur peningur*

Innistandandi í Landsbankanum minkaði frá 2004 til 2006 við sløkum 400 mió.kr. og innistandandi peningurin var hesi árini niðanfyri minstainnlánið á 1.500 mió.kr. Við ágóðanum av søluni av P/f Føroya Banka, 1.200 mió.kr., hækkaði innistandandi aftur. Síðani 2007 er innistandandi í Landsbankanum minkað góðar 700 mió.kr.

mió.kr.

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | *2009* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Innist. Landsbankin | 1.473 | 1.293 | 1.093 | 2.467 | 2.158 | *1.551* |
| Banka- og girokontur | 350 | 403 | 392 | 297 | 350 | *499* |
| Kassakontur | 1 | 1 | 0 | 1 | 1 | *-5* |
| **Tilsamans** | **1.824** | **1.697** | **1.485** | **2.765** | **2.509** | ***2.045*** |

[5] Búskaparskipan Landsins 8. februar 2010

Sambært yvirlitinum frammanfyri, var inniognin hjá landskassanum árini 2004 – 2006 niðan fyri roknaða minsta innlánið, 1.500 mió.kr. Síðani 2007 hækkaði inniognin aftur. Høvuðs-orsøkin til hækkaðu inniognina í 2007 er ágóðin av seldu partabrøvunum í P/f Føroya Banka.




Sum er, er minsta innlánið í Landsbankanum 1,5 mia.kr. Smbrt. §2 í Ll. nr. 31/1995 "um landskassans innlán og lán í Landsbankanum" skulu innlánini í Landsbankanum í minsta lagi svara til 15% av bruttotjóðarúrtøkuni árið frammanundan. Sostatt skuldi minstainnlánið í Landsbanka Føroya í 2007 verið 1.760 mió.kr., í 2008 1.862 mió.kr. og í 2009 1.871 mió.kr.

### *5.3.2 Goymslur og áogn v.m.*

Samlaðu áognir landskassan hava seinastu árini verið støðugar, tó við undantaki av í 2007, tá eftirstøður til skatt, toll o.t. saman við aðrari áogn lá á einum hægri støði.

mió.kr.

| | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | ***2009*** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Goymslur | 36 | 38 | 44 | 52 | 61 | ***56*** |
| Tænastu og vøruskuld | 84 | 119 | 106 | 123 | 123 | *97* |
| Skatt, toll,o.t. skuldarar | 234 | 190 | 230 | 304 | 183 | *212* |
| Tíðaravm, Onnur áogn | 109 | 79 | 46 | 185 | 123 | *178* |
| **Tilsamans** | **463** | **426** | **426** | **663** | **490** | ***543*** |




**Tænastu-, vøruskuldarar o.t.:** Talan er um áogn hjá almennum stovnum, so sum, Apoteks-verkinum, Kringvarpi Føroya og Landsverk o.a.

**Skatta-, toll- o.t. skuldarar:** Saldan á hesari kontu eru ikki goldin lógarkrøv o.t. Krøvini eru bæði mótvegis borgarum og feløgum.

**Tíðaravmarkingar og onnur áogn:** Undangoldnar útreiðslur t.d. lønir, innskot og onnur áogn.

### *5.3.3 Skatta, toll- o.t. skuldarar:*

Niðanfyristandandi talva og strikumynd vísa gongdina í eftirstøðunum av landsskatti, felagsskatti, meirvirðisgjaldi og tolli árini 2004-2009.

1.000 kr.

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | *2009* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Landskattur | 56.971 | 48.630 | 93.492 | 103.461 | 46.967 | *52.249* |
| Felagsskattur | 153 | 14.140 | 13.085 | 15.785 | 11.022 | *38.440* |
| MVG | 32.921 | 29.625 | 38.588 | 34.213 | 39.523 | *49.710* |
| Tollavgjøld | 89.819 | 62.647 | 50.984 | 116.940 | 54.148 | *48.971* |




## 5.4 Skuld landskassans

Niðanfyri er ein talva, sum lýsir skuld landskassans. Landskassin hevur árini 2004 til 2007 havt eina støðugt vaksandi stuttfreistaða skuld. Í 2008 veitti landskassin gjaldsførislán til íslendsku ríkisstjórnina uppá 300 mió.kr.

mió kr.

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | *2009* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Stuttfreistað | 483 | 584 | 592 | 719 | 971 | *581* |
| Langfreistað | 3.653 | 3.625 | 2.725 | 2.660 | 2.619 | *3.092* |
| **Tilsamans** | **4.136** | **4.209** | **3.317** | **3.379** | **3.590** | ***3.673*** |

Langfreistaða skuldin hevur seinastu trý roknskaparárini verið rættiliga støðug. Umframt lán úr Danmark á 500 mió.kr., er talan um lánsbrøv.

